# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



4. mai fingu Kristbjørg og Joen Eriksen eina dóttir, hon vigaði 3900 gram og var 56 cm long. Hon eitur Eva. Her situr hon saman við systur sínari Rebekku.

8. mai fingu Jeanni og Esmar Sørensen, Viðareiði, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 4300 gr.

11. mai fingu Elin Hertha Hammer, Runavík, og Bjarti Jøkladal, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3900 gr.

12. mai fingu Karin Margretha og Aksel Larsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 3110 gr.

13. mai fingu Elsa og Kári Clementsen, Toftum, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3500 gr.

13. mai fingu Marin Magnusdóttur og Kári Østerø, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2950 gr.

14. mai fingu Joan Kjelnæs og Rúni Patursson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4000 gr.

14. mai fingu Sandra og Jallur Poulsen, Strondum, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3450 gr.

15. mai fingu Kirstin Ferjá Hansen og Ivan Hansen, Kollafirði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3900 gr.

15. mai fingu Sonja Herietsdóttir og Nicolaj Falck, Nólsoy, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4350 gr. Jón er blivin stóribeiggi.

16. mai fingu Rannvá og Eystein í Løðu, Bøur, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4000 gr.

16. mai fingu Malla Dam og Søren Hjarbæk Jensen, Tvøroyri, ein son. Hann var 48 cm. langur og vigaði 2370 gr.

18. mai fingu Sólrun Sørensen og Egin Fríði Ørvarodd, Viðareiði, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2815 gr.

## Andlát

11. mai
Andras í Frammistovu í Hvannasundi, 73 ár.

13. mai
Hanna Danielsen, Nólsoy, 79 ár.
Poul Henrik Poulsen, 39 ár.

15. mai
Eilif Hansen, Fuglafjørður, ættaður úr Vestmanna, 71 ár.
Sámal Thorsteinsson, Klaksvík, 82 ár.
Arne Holger Spangenfeld, gartnari, Tórshavn, 85 ár.
Símun Jóhannus Poulsen, Klaksvík, 85 ár

16. mai
Hjallgrím Magnussen, fyrrv. Løgreglumaður, Tórshavn, ættaður úr Trongisvági, 79 ár
Rigmor Jacobsen, Klaksvík, 92 ár.
Elibert Kirke, úr Saltnesi, 90 ár.

17. mai
Eli Poulsen við Neyst, Hvalba, 87 ár.

# Kendur havnarmaður 75 ár



Mánadagin 23. mai 2005 fyllir ein kendur havnarmaður og ein býarmynd 75 ár. Talan er um Brynjolf Jepsen á Suðuroyarvegi 17.

Brynjolf er havnarmaður við stórum H og B-36-ari við stórum B.

Sum ungur sigldi hann í nøkur ár og lossaði fyri ymisk skipafeløg í Havn.

Í 1955 fekk hann starv hjá Tórshavnar kommunu, har hann arbeiddi í 40 ár, til hann legði frá sær í 1995.

Brynjolf er kendur sum ein blíður, skemtingarsamur og fyrikomandi maður, sum altíð gevur sær tíð til eitt hugnaligt prát. Hann hevur stóran áhuga í málningalist, ið hann eisini hevur sum frítíðarítriv. Hann hevur eisini verið við á onkrari framsýning á Eysturskúlanum.

Í mong ár var hann nevndarlimur í Føroyskt Bretskt Felag. Áhugin fyri Bretlandi kom undir krígnum, tá hann var smádrongur og upplivdi bretsku hermenninar her.

Foreldrini hjá Brynjolf vóru Petra Torkilda Hansen, f. Johannesen, ættað úr Klaksvík, og Svend Erik Jepsen, telefrafistur, sum var dani og arbeiddi á Telegrafstøðini í Havn.

Føðingardagurin verður hildin í B36-húsinum fríggjadagin 27. mai kl. 19.00, har øll eru vælkomin.

## Fyrstu mopsarnir fingið hvølpar

Tíkin Josie hjá Elsu Mariu Bærentsen í Hoyvík fekk herfyri 6 hvølpar, ið eru teir fyrstu av sínum slag í Føroyum. 4 hannar og 2 tíkir. Talan er um hundaslagið mops.

Josie, ið er trý ára gomul, varð parað við Cleo hjá Sunnivu Petersen í Havn. Cleo er 2 ára gamal.

Mopsar ella moppur, sum teir eisini verða nevndir, stava upprunaliga frá kinesiska Happa-hundinum. Teir hoyra til bólkin tempul- og hovhundar. Mopsarnir vórðu t.d. brúktir sum vakthundar á tempulmúrum. Í 1598 hevði danski kongurin Christian tann 4. og drotningin, Anna Cathrine, ein lítlan mops tey nevndu Türck.



*Tíkin Josie við sínum 6 hvølpum, ið eru teir fyrstu av sínum slag í Føroyum*

## Brúdleyp

Í dag, 21 mai kl. 14.00 giftast í Kelduni í Skálafirði Guðrun Clementsen, Hoyvík og Hans Ove Johansen, Eiði. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00.

Í dag, 21. mai kl. 13.00 giftast í heiminum Randi Simonsen og Karsten Jespersen, Norðdepli. Tey, ið vilja gleðast saman við brúðarparinum, eru vælkomin í hølið hjá Arbeiðsmannafelagnum í Norðdepli ímillum kl. 18.00 og 24.00.

## 90 ár

Sunnudagin 22. mai fyllir Olivia K. Joensen, úti á Bø í Leirvík 90 ár. Føðingardagurin verður hildin fyri innbodnum í Missiónshúsinum leygardagin 21. mai kl. 14.00.

Børnini

## 70 ár

Mánadagin 23.05 fyllur Tóra Johannesen, Norðskála 70 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Tóru, eru vælkomin leygarkvøldið 21.05 frá kl. 17. Dagurin verður hildin á Skála hjá soninum Johannus Juhl.